# Gravgaard til Nantes

FC Keypmannhavn hevur mist sín liðformann. Verjuspælarin Michael Gravgaard er seldur til franska felagið Nantes. Samráðingarnar hava vart í nakrar vikur, og nú er klárt hjá Gravgaard at skriva undir. - Vit hava ikki ætlað okkum at selja Michael, men vit fingu eitt tilboð, sum vit ikki kundu siga nei til, sigur ítróttarstjórin í FCK, Carsten V. Jensen. 30 ára gamli Michael Gravgaard hevur spælt fyri FCK síðani summarið 2005, tá hann kom úr Viborg.



# Aftur fiasko hjá Foldgast

Danska heimasíðan bold.dk hevur skrivað um skiftið hjá Peter Foldgast og Anders Post til føroyskan fótbólt, og um vikuskiftið skrivar bold.dk soleiðis: EB/Streymur hentede ti sejre og spillede to uafgjorte i deres første 12 kampe i sæsonen, og alt pegede på et færøsk mesterskab. For at køre guldet sikkert i hus hentede man danske Peter Foldgast og Anders Post, men det har ikke været nogen succes. De to danskeres første kamp, mod Vikingur, blev tabt med 2-0, og i aftes var den så gal igen. Oprykkerne IF Fuglafjørdur vandt på hjemmebane med 2-0.

## Nú eydnaðist tað

- Í løtum eydnaðist tað, sum als ikki eydnaðist í Fuglafirði. Vit hava møguleikan at skylda upp á túrin í Svøríki fyri avrikið mikukvøldið. Men vit kunnu vera væl nøgdir í dag.

Jákup á Borg var sjálvsagt fegin eftir sannførandi sigurin í Gundadali í gjár. Landsliðsleikarin setti sjálvur hol á málskjótingina, men serliga kom Andrew av Fløtum í miðdepilin við sínum hattricki.

- Hann hevur roynst væl hjá okkum í ár. Tað hevur verið nøgv tosað um framrættaða spælið hjá okkum í seinastuni, men Andrew av Fløtum vísti veruliga, hvat hann dugir í dag, staðfestir Jákup á Borg.

## Seinast var í 2001

Í 10. umfari í 2001 eydnaðist tað B68 at vinna við tveimum málum móti einum á HB. Tilveran í bestu deildini hevur verið skiftandi hjá toftamonnum seinnu árini, men tað hevur ikki eydnaðst B68 at fingið fult móti teimum reyðu og svørtu síðan.

Stóra hetjan í dystinum fyri sjey árum síðan var Fróði Benjaminsen, sum stóð fyri báðum málunum. Landsliðsleikarin, sum í dag er liðskipari hjá HB, var millum málskjúttarnar í knúsandi 5-0 sigrinum í gjár.

HB-B68 5-0 (1-0):

# HB aftur á beint

**HB vann knústandi stórsigur í Gundadali í gjár, tá B68 vitjaði. Rúni Nolsøe og leikarahópurin komu aftur á beint, hóast nógv arbeiði skal gerast fyri at sleppa úr aldudalinum**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

*HB*

*B68*



*Andrew av Fløtum kom heilar tríggjar ferðir á máltalvuna, har tað síðsta var heldur tilvildarligt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað hevur ikki verið lætt hjá Rúna Nolsøe seinastu dagarnar. Úrslitini hava als ikki verið nøktandi, og í leikarahópinum tykist lagið ikki verða nakað serligt. Seinasta dømið um hetta var, at málverjin Tróndur Vatnhamar í vikuni takkaði fyri seg í Havnar Bóltfelag.

Í gjár reistist liðið tó av álvara. Við knúsandi 5-0 sigri noyddust toftamenn eyðmýktir úr aftur høvuðsstaðnum. Sannførandi avrikið hevur uttan iva við sær, at arbeiðsfriður verður í HB komandi dagarnar – og tað er í øllum førum neyðugt.

### Báðar vegir

Rúni Nolsøe hevði tvær broytingar í byrjunaruppstillingini samanborið við dystin í Fuglafirði mikukvøldið. Milan Kuljic, sum ofta hevur hug at taka ferðina úr spælinum, var á beinkinum. Í hansara stað var Ólavur í Ólavsstovu. Poul Thomas Dam var aftur á vinstra vongverja fyri Rasmus Nolsøe.

Ikki tí, tað vóru ikki hesar skiftingarnar, ið høvdu avgerandi týdning. Gestirnir smæddust ikki í nærdystunum, og serliga var stuttligt at síggja Arnbjørn Danielsen, sum als ikki ræddist. Kanska heldur hinvegin var hann ræðandi.

Teir reyðu og svørtu løgdu seg á odda, tá fyrsti fjórðingurin av dystinum var leiktur. Mortan úr Hørg sendi meistarliga inn um verjuna, har bæði Andrew av Fløtum og Jákup á Borg – einsamallir við málverjan – sendu beint á Vlada Filipovic. Hesin seinni nevndi fekk bóltum um málstrikuna í aðru atløgu. Tað hevur staðið nógv á landsliðsleikarunum í HB, sum eru skeldaðir fyri sera løk avrik á vøllinum. Tað merktist eisini á Jákupi á Borg, at málið lætti um.

Dysturin í síni heild var javnur. Gestirnir høvdu ikki nógv at bjóða í framrættaða spælinum, men hinvegin vardu teir væl fyri royndunum hjá heimaliðnum.

### Skrædl

Øssur Hansen royndist sera væl í fyrra umfarinum. Í verjustøðu stóð hann væl, og við fleiri vandamiklum innleggum var hann eisini ein hóttan hjá HB. Tí var tað ein dyggur smeitur, at fyrrverandi landsliðsleikarin noyddist út við skaða í lærkrikanum. Kristian Anton Andreassen var eftir hvíldina fluttur á vinstra vongverjan. Og hann hevði ríkiligt at trupulleikum.

HB skoraði fýra ferðir í seinna hálvleiki. Toftamaðurin Fróði Benjaminsen økti um leiðsluna stutt inn í seinna hálvleik. Andrew av Fløtum kom heilar tríggjar ferðir á máltalvuna, har tað síðsta var heldur tilvildarligt.

B68 hevði eina veruliga málroynd í seinna umfarinum, tá Ndende Adama Gueye eftir frálíkt einmansavrik rakti í stólpan.

### Steðgurin

Sannførandi sigurin var kærkomin. Tað hevur ikki altíð verið líka stuttligt at staðið við síðulinjuna hjá HB, men sunnudagurin var ein av teimum góðu hjá Rúna Nolsøe. Nógv arbeiði skal framvegis gerast, um felagið skal sleppa úr aldudalinum. Jákup á Borg tóktist í fleiri førum týðiliga misnøgdur um avgerðirnar hjá dómaranum. Tað skal verða ósagt, at tað var orsøkin, at landsliðsleikarin var útskiftur eftir einum tíma – men okkurt bendir á tað.

Tað merktist á áskoðaraplássunum, at sigursvanda felagið hevur verið í trupulleikum. Fleiri tóm setur vóru í HB-húsinum, og hóast summi høvdu leitað sær niðan á bakkan í dýrdarveðrinum, so vóru fá fólk til dyst í Gundadali í gjár.

B68 tapti fyri aðru ferð í slag, og sigurin hjá sandoyingum á Skála í gjár hevur við sær, at toftamenn aftur eru við í stríðnum um niðurflyting. Komandi vikuskiftið verður seinasti umfari undan summarsteðginum. Spurningurin er, hvussu feløgini fara at nýta hendan. HB rennur framvegis aftaná oddaliðnum EB/Streymi, sum eisini er í einum aldudali í løtuni. Havnar Bóltfelag er tilkikið fyri at reisast burtur úr ongum, men nú fáa vit at síggja.